**Fylgiskjal 1**

## Javntekstur

| Galdandi lóggáva | Broytingaruppskot |
|---|---|
| **§ 12, stk. 1.** Í sambandi við fyriskipan sbrt. § 9, stk. 1, nr. 1, 4, 5 og 6 verður stuðul veittur til uppihald sambært fylgjandi ásetingum:<br>1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 100% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 80% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>3) [4)] Persónur 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 85% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>4) [4)] Persónur 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 60% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>5) Persónur yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum, og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 50% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>6) Persónur yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum, og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 30% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. | **§ 12, stk. 1.** Í sambandi við fyriskipan sbrt. § 9, stk. 1, nr. 1, 4, 5 og 6 verður stuðul veittur til uppihald sambært fylgjandi ásetingum:<br>1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **17.866 kr.** um mánaðin.<br>2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **14.293 kr.** um mánaðin.<br>3) Persónur 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **15.186 kr.** mánaðin.<br>4) Persónur 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **10.720 kr.** um mánaðin.<br>5) Persónur yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **8.933 kr.** um mánaðin.<br>6) Persónur yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **5.360 kr.** um mánaðin. |
| **§ 12, stk. 2.** Dagpeningaupphædd sbrt. stk. 1 er at skilja sum hægsta útgjald sambært lóg um dagpening vegna sjúku v.m., frítíðarløn ikki íroknað. Sambúgvandi er at skilja sum persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persóni. | **§ 12, stk. 2.** Sambúgvandi er at skilja sum persónur, sum býr saman við øðrum vaksnum persóni. |
| **§ 13 a., stk. 1.** Hóast ásetingarnar í § 12, stk. 1 verður stuðul til uppihald til lesandi, ið fáa lestrarstuðul, sambært løgtingslóg um | **§ 13 a., stk. 1.** Hóast ásetingarnar í § 12, stk. 1 verður stuðul til uppihald til lesandi, ið fáa lestrarstuðul, sambært løgtingslóg |

| | |
|---|---|
| lestrarstuðul, veittur sambært fylgjandi ásetingum:<br>1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 37% avdagpeningaupphæddini um mánaðin. Fyri hvørt barnið aftrat fyrsta barninum, ið hevur skrásettan bústað hjá viðkomandi, lækkar veitingin við 20%.<br>2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 34% av dagpeningaupphæddini um mánaðin. Fyri hvørt barnið aftrat fyrsta barninum, ið hevur skrásettan bústað hjá viðkomandi, lækkar veitingin við 18%.<br>3) Persónur, 25 ár ella eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 50% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>4) Persónur, 25 ár ella eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 28% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>5) Persónur, yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá foreldrum, og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 21% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>6) Persónur, yngri enn 25 ár, ið býr hjá foreldrum, og ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, fær 16% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>7) Persónur, ið er uppihaldari at barni, og sum livir í samlívi ella er giftur við persóni, ið er lesandi, og sum móttekur lestrarstuðul, fær 44% av dagpeningaupphæddini um mánaðin.<br>8) Persónur, ið býr einsamallur, og sum rindar barnagjald fær 50% av dagpeningaupphæddini.<br>9) Persónur, ið er sambúgvandi, sum ikki hevur heimabúgvandi børn, men sum rindar barnagjald, fær 28% av dagpeningaupphæddini.<br>10) Umframt veiting sbrt. nr. 8 og 9 verður veitt ein viðbót samsvarandi við vanligt barnagjald. | um lestrarstuðul, veittur sambært fylgjandi ásetingum:<br>1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **6.610 kr. um** mánaðin. Fyri hvørt barnið aftrat fyrsta barninum, ið hevur skrásettan bústað hjá viðkomandi, lækkar veitingin við 20%.<br>2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **6.074 kr.** um mánaðin. Fyri hvørt barnið aftrat fyrsta barninum, ið hevur skrásettan bústað hjá viðkomandi, lækkar veitingin við 18%.<br>3) Persónur 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur u**ppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **8.933 kr.** mánaðin.<br>4) Persónur 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **5.002 kr.** um mánaðin.<br>5) Persónur yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **3.752 kr.** um mánaðin.<br>6) Persónur yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur **uppihaldsskyldu** mótvegis barni, fær **2.859 kr.** um mánaðin.<br>7) Persónur, ið er uppihaldari at barni, og sum livir í samlívi ella er giftur við persóni, ið er lesandi, og sum móttekur lestrarstuðul, fær **7.861 kr.** um mánaðin.<br>8) Persónur, ið býr einsamallur, og sum rindar barnagjald, fær **8.933 kr.** um mánaðin.<br>9) Persónur, ið er sambúgvandi, sum ikki hevur heimabúgvandi børn, men sum rindar barnagjald, fær **5.002 kr.** um mánaðin.<br>10) Umframt veiting sbrt. nr. 8 og 9 verður veitt ein viðbót samsvarandi við vanligt barnagjald. |

| | |
|---|---|
| | **§ 13a, stk. 3. Upphæddir sambært stk. 1 og § 12, stk. 1 verða javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.** |